

*Rættiliga nógv virksemi hevur verið á landingarmiðstøðini Kongshavn gjøgnum fleiri ár, men nú er tómligt við bryggjukantin, og gólvini á landingarmiðstøðini hava verið turr í ein mánaða*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Gólvini turr ein heilan mánað

**Flestu teirra, sum hava starvast á landingarmiðstøðini Kongshavn, hava verið við hús seinasta mánaðin, men tey eru ikki søgd úr starvi. Nú verður ikki roknað við nakrari landing aftur, fyrr enn greiða er fingin á, hvussu verður við landingarmiðstøðini**

Vilmund Jacobsen

Landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará, sum er eitt dóttirfelag eftir trotabúgvið hjá Faroe Seafood-samtakinum, hevur onga landing havt í ein góðan mánaða.

Í gjár var júst ein mánaður síðan, at landingarmiðstøðin landaði seinastu skipini. Síðan tá er eingin fiskur komin upp á land, og gólvini hava verið turr. Fólkini, sum hava havt sítt arbeiði á landingarmiðstøðini, eru ikki uppsøgd. Eins og fólk á fiskavirkjunum, hava hesi – enn - síni rættindi í fiskavirkisskipanini hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Eftir at teir seks partrolararnir hjá Faroe Fish II, sum eisini er eitt dóttirfelag hjá Faroe Seafood-samtakinum, vórðu lagdir tíðliga í desember, hevur lítið virksemi verið á landingarmiðstøðini Kongshavn.

Teir seks partrolararnir, sum vórðu lagdir, samstundis sum samtakið endaði Skiftirættinum, vóru Bakur, Stelkur, Rókur, Lerkur, Heykur og Falkur.

Onnur skip, sum Faroe Seafood átti part í, hildu fram at sigla, og millum hesar vóru partrolararnir, Jaspis og Ametyst og djúpvatnstrolarin, Edna.

Men tað eru ikki bara skipini, sum Faroe Seafood samtakið átti ella átti part í, sum løgdu sína veiði upp í Saltangará.

Aðrir trúgvir gestir á Kongshavn gjøgnum fleiri ár hava verið Polarhav og Stjørnan, og í gulllaksatíðini hevur Eysturbúgvin lagt nógvar lastir upp í Saltangará.

### Húsagangur og verkbann

Tað eru tvinnar orsøkir til, at so lítið virksemi hevur verið á Kongshavn higartil í ár. Eitt er húsagangurin, og annað er verkbannið, sum Føroya Reiðarafelag lýsti fyri meiri enn trimum vikum síðan, eftir at partarnir í sáttmálaósemjuni millum reiðarar og manningarfeløg ikki kundu semjast.

Flestu teirra, sum hava starvast á landingarmiðstøðini, hava verið við hús seinasta mánaðin, men tey eru ikki søgd úr starvi.

Landingarmiðstøðin er millum ognirnar í Faroe Seafood-samtakinum, sum eru lýstar til sølu, og hin 11. februar skulu møgulig tilboð verða inni.

Leggjast kann aftrat, at raksturin av landingarmiðstøðini Kongshavn hevur hingið saman við einum lítlum avlopi í fleiri ár.

Í rakstrinum av eini landingarmiðstøð er umráðandi, at avlopið ikki er størri enn neyðugt, tí annars verður tænastan ikki kappingarfør – og eitt stórt avlop hevði merkt, at meirkostnaðurin hevði verið tikin burtur av fiskaprísinum.

Nú dagurin fyri innkomnum boðum upp á ognirnar hjá Faroe Seafood-samtakinum er so nær, er ikki væntandi, at nøkur landing verður aftur á Kongshavn, fyrr enn greiða er fingin á, hvussu verður við landingarmiðstøðini.

*vilmund@sosialurin.fo*




*Arbeiðsfólkini eru við hús, men eru ikki uppsøgd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Kunngjørt verður, at okkara kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Jóannes Simonsen**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 92 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Bjørg, Steinar, Lív og Unn**

Tey, ið vilja minnast Jóannes, kunnu lata Stjørnulon eina gávu, konta í Bank Nordic.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum vístu samkenslu og umsorgan, tá okkara góði maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og beiggi

**Sommer Winther**

doyði og fór til gravar.

Takk til Hera Joensen, prest, fyri troystarrík og góð orð í kapelli og kirkju. Takk til sangarar úr Skopun, Sigrid Sivertsen fyri góðan sang í kirkjuni, takk til kirkjutænarar, berarar og gravarar.
Takk til tykkum øll, sum á ein ella annan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervinum. Tøkk til tykkum, ið ringdu, takk fyri blómur, kransar og til tykkum, sum fylgdu Sommer til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Bjørga, Ida, Jói, Róhild og Sveinbjørn**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Sólbjørn Jacobsen**
**Tórshavn**

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest, organistar, sangarar, berarar og øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.
Takk fyri kransar, blómur, heilsanir og peningagávur til Hjartafelagið.
Takk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Else**
**Lars, Gunnvá og Lisbeth við familjum**